# Konfirmantar hittust 40 ár seinni

**Eftir 40 ár, hittust konfirmantar frá 1962 aftur í Vágs kirkju í oktober í ár**



*Konfirmantar 21. oktober 1962, Vágs kirkja*

KONFIRMANTAR
*Dagfinn Olsen*

Tann 21. oktober í 1962 vóru 36 ungfólk konfirmerað í Vágs kirkju. Í oktober í ár vóru 40 ár liðin og nøkur teirra tóku stig til eina samkomu, fyri at savna so mong, sum gjørligt, aftur.

20 teknaðu seg til samkomuna. Av konfirmantunum í Vágs kirkju í 1962 eru tvey deyð. Fleiri búgva í Danmark og hjá fleiri teirra lá ikki fyri at koma. Nøkur eru eisini farin norðureftir at búgva, til Havnar og aðrastani. Vegna veður sluppu tey ikki suður til Suðuroyar til samkomuna, sum var tann 13. oktober í ár.

Sostatt hittust 16 av konfirmantunum í Vágs kirkju í oktober 1962 aftur á samkomu tann 13. oktober 2002.

Fleiri teirra, ið ikki høvdu høvi at vera við, høvdu hugsað sær at sæð hini aftur. Tí eru ætlanir um at skipa enn eina samkomu seinni, tá aftur eitt runt áramál er runnið, men enn er einki ásett.



*Konfirmantar hittast 40 seinni, tann 13. oktober 2002, Vágs kirkja*

Í 1962 var Veyhe prestur. Konfirmantarnir vóru: Emma Midjord, Lopra, Elisabeth Jensen, Porkeri, Petrea Djurhuus, Porkeri, Sólvá Nolsøe, Vágur, Marjun Dahl, Vágur, Eyðbjørg Niclasen, Vágur, Lorensa Poulsen, Vágur, Marianna Poulsen, Sumba, Johanna Sofía Kjærbo, Sumba, Sonja Jensen, Sumba, Anni Tausen, Hov, Hansina Larsen, Porkeri, Finngerð Augustinussen, Vágur, Sólgerð Samuelsen, Vágur, Elsebeth Joensen, Sumba, Jóna Bech, Porkeri, Kirsten Joensen, Vágur, Brynhild Bech, Porkeri, Jonny Rættá, Vágur, Sommer Joensen, Sumba, Salmun Bech, Porkeri, Egil Thomsen, Sumba, Petur Dahl Nolsøe, Vágur, Hans Pauli Strøm, Vágur, Lundahl Augustinussen, Vágur, Martin Midjord, Lopra, Georg Dahl, Vágur, Páll Augustinussen, Vágur, Jarmund Djurhuus, Porkeri, Sofus Strøm, Vágur, Martin Strøm, (deyður),Vágur, Danjal Johan Lisberg, Sumba, Magnus Veyhe, Porkeri, Jákup Hjelm, (deyður),Vágur, Bjarki Hovgård, Hov, Óli Emil Olsen, Vágur.

# Siloakórið gevur fløgu út

**Í dag kemur fløgan hjá Siloakórinum í sølubúðirnar. Á fløguni eru 12 sangir, ið allir hava andaligt innihald, men eru av sera ymiskum uppruna. Millum sangirnar eru spiritual, enskir sálmar, amerikansk løg og 5 sangir, sum eru uppruna føroyskir, bæði orð og lag. Sangirnir eru avbera vakrir og væl framførdir, og er fløgan ein góð jólagáva**

ÚTGÁVUR
*Rúna Sivertsen*



*Avbera vøkru og ljósu røddirnar hóska væl til heitið á fløguni, "Nú ljósur er mín vegur", sum Siloakórið í Fuglafirði í dag kemur á markanðin við. Myndin er tikin undir venjing í Siloa mikukvøldið*

*Mynd Øssur Mohr*

Fløgan, sum Siloakórið í dag kemur á marknaðin við, má sigast at vera ein rættilig fuglfjarðafløga, tí millum orð- og lagsmiðir teljast fleiri fuglfirðingar. Victor Danielsen og Ismar Joensen eiga fleira av tekstunum og brøðurnir, Jógvan og Eyðun á Lakjuni, eru lagsmiðir til fleiri av sangunum. Martin Simonsen, sum eisini er fuglfirðingur, hevur gjørt eitt av løgunum. Síðani 1988, hevur sangkórið í Siloa í Fuglafirði verið virkið uttan steðg. Tað er Eyðun á Lakjuni, ið stjórnar kórinum, sum telur um 30 sangarar.

Flestu teirra eru úr Fuglafirði, men verður kórið eisini stuðlað úr øðrum bygdum í Eysturoynni. Kórið syngur fyri tað mesta á møtum, men seinnu árini hava tey eisini havt konsertir.

Útgevararinir siga, at tankin um at geva fløgu út er sprottin so við og við. Fyrst var ætlanin bert at syngja nakrar sangir til útvarpið. Við tí fyri eyga, kom Pauli Magnussen, tøkningur í Útvarpi Føroya, í 1999 til Fuglafjarðar at gera hesar upptøkur.

Sum tíðin er liðin og lurtað hevur verið eftir upptøkunum, er ynski um at geva hetta út komið aftur og aftur.

– Tað er okkum ein stór gleði at geva hesar sangir út á fløgu. Hóast vit vita, at hetta ikki er lýtaleyst, er vón okkara, at sangirnir verða til gleði og signing fyri mong, sigur Eyðun á Lakjuni, kórleiðari.

Orgulfylgispælið eigur Martin Simonsen, klaverfylgispælið Jógvan og Eyðun á Lakjuni. Solistur er Edna Jacobsen. Forsíðumyndina hevur Øssur Mohr málað.

Heitið á fløguni, "Nú ljósur er mín vegur", er úr sálminum, "Í deyðaskuggans landi", sum Victor Danielsen yrkti.

Fløgan, sum er at fáa í sølubúðunum kring landið, kostar kr. 159.

Vikuskifti

Nr. 241 • leygardagur • 14. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Tá framtíðin gerst viðkomandi

Hugurin fyri Science fiction varð kveiktur longu í barnaárunum í Skúgvi. Nú hevur Hanus Kamban skrivað fyrstu føroysku bókina, sum burturav inniheldur og viðger vísindaskaldskap

Lesið síðu 11 og 12





*Í Barnagarðinum á Konmansmýru í Havn eru tey veruliga komin í jólahýr. Stovurnar eru prýddar og jólaklipp er á skránni hvønn dag*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Jól í Túgvuni

Í Barnagarðinum á Konmansmýru eru tey veruliga komin í jólahýr. Børnini klippa jólapynt og gera klárt til jóla. Jólaveitslan hevur longu verið, men enn bíðar jóladøgurðin, har børnini eisini hava ein leiklut

JÓLAHUGNI
*Ingrid Bjarnastein*

Hóast veðrið als ikki bendir á, at jólini eru í hondum, so hevur hetta ikki ávirkað tey í Barnagarðinum á Konmansmýru í Havn. Inni í Túgvuni, sum er ein av teimum trimum stovunum í barnagarðinum, er pyntað frá lofti til gólv, og eru tað børnini, sum hava staðið fyri meginpartinum.

Í vindeyganum eru perur og ljós, og runt alla stovuna hanga einglar, jólastjørnur, kramarhúsar, nissur og annað, sum bendir á, at jólini nærkast við stórum fetum.

Nógvur gangur er inni, og nøkur børn sita rundan um eitt borð og klippa jólapynt. Onnur spæla í stóra spælihúsinum, sum eisini er pyntað við nissum, jólaperum og øðrum.

## Loyniligar jólagávur

– Nú til jóla hava vit klipt stjørnur, nissuhúgvur, kramarhúsar, jólatrø og so víðari, sigur Emi, sum er ein av teimum, sum starvast í Túgvuni.

– Vit hava eisini gjørt jólagávur til foreldrini, men vit kunnu ikki fortelja tykkum, hvat tað er, tí tað er loyniligt.

Í vindeygakarminum standa í dag 11 ljós. Hetta er ársins jólakalendari. Hvønn dag verður eitt nýtt ljós tendrað.

Í Túgvuni eru 18 børn frá 3 – 6 ár. Fitt eru tey. Tey fjeppast uppi í fotografinum og spyrja, um hann tímur at taka mynd av teimum. Ósmæðin barnahjørtu.

Við borðið sita tey við saksi, lími, glitur og nógvum pappíri og klippa. Millum hesi situr Rani, sum eisini hevur klipt sær eitt jólatræ. Hann er fimm ár.

– Eg gleði meg til jólar, sigur hann smílandi.

– Eg veit ikki ordiliga, hvat eg ynski mær, men eg fari at hyggja í BR-blaðið, so veit eg, hvat eg ynski mær í jólagávu.

Tá spurt verður, hvat hann plagar at fáa, svarar hann bara, at tað er alt møguligt.

Í eini skál standa mandarinir. Angurin av mandarinum ger tað bara uppaftur jólaligari inni í stovuni.

Túgvan hevur longu havt jólaveitslu. Tá vóru foreldrini eisini við, og dansað varð jólatræ og jólamaðurin var eisini á vitjan.

Vár, sum er trý ár, situr við ein enda á borðinum. Hon hevur klipt sær ein jólamann, og nú situr hon hugagóð og litar hann við blýanti.

– Tá eg var lítil, hevði eg ein grønan saks, sum er til lám, sigur hon.

Jólamaðurin er nú næstan svartur av allari litingini. Men buksurnar eru hvítar.

- Glitur at líma upp á pyntið dámar børnunum ógvuliga væl, siga Emi og Maria. Og um hugt varð runt um borðið, so sótu mín sann næstan øll og límaðu glitur á jólamenninar og trøini.

Um ikki so leingi verður jóladøgurði. Til hetta høvið hava børnini klipt okkurt serligt til gløsini sum tey skulu drekka úr. Eisini hava tey klipt eina kurv í part, tí tey hava eisini gjørt bomm, sum tey skulu leggja í hana.

Millummáli nærkast, og børnini byrja at gerast ótolin. Tey fara út í gongina at renna, men koma skjótt innaftur. Vit takka fyri okkum, og fara útaftur. Sólin hevur hug at kaga fram, og meðan vit ganga, rópa børnini bei eftir okkum.